


# tryggja teg og tíni...

# Restskuldartrygging

UM RESTSKULDARTRYGGING

Við eini Restskuldartrygging kanst tú tryggja tey avvarðandi, soleiðis, at skuldin ella partur av henni verður útgoldin, skuldi so borist á, at tann tryggjaði doyr. Hjúnafelagin kann somuleiðis tekna eina tilíka trygging.

HVØR KANN TEKNA RESTSKULDARTRYGGING?

Fyri at tekna eina Restskuldartrygging, skalt tú ikki hava fylt 50 ár og tú skalt hava lán frá Norðoya Sparikassa. Realkredittlán, sum sparikassin veitir frá DLR, eru eisini fevnd. Gjørligt er at verða verandi í Restskuldartryggingini, til tú hevur fylt 67 ár.

TRYGGINGARUPPHÆDD

Tryggjast kunnu upp til kr. 2.000.000. Eisini ber til at tekna Restskuldartrygging fyri ein part av samlaðu restskuldini. Samlaða tryggingarupphæddin fyri Restskuldartrygging og Kundatrygging kann tó ongantíð vera hægri enn kr. 2.000.000.



- Tryggja tíni kæru!

# Restskuldartrygging

Restskuldartrygging kann teknast sum krosslívstrygging ella egintrygging

KROSSLÍVSTRYGGING
Tá lántakarin tryggjar hjúnarfelagan ella sambúgvan, sum eisini stendur fyri láninum, er talan um krosslívstrygging. Tryggingarupphæddin verður tá goldin inn á lán hjá hjúnarfelaganum ella sambúgvanum, eftir at búgvið er gjørt upp.

Í arvalógini eru viðurskifti sum gera, at fyrimunir eru við krosslívstryggingini, sum verður útgoldin, eftir at búgvið er gjørt upp. Harvið økist virðið av ognini ikki, sum møguliga skal skiftast við arvingarnar.

Um skuldin er minni enn útgoldna tryggingarupphæddin, verður avlopið útgoldið til tann, sum hevur teknað tryggingina. Arvaavgjald skal í hesum føri ikki rindast.

Tryggingartakarin kann eisini tilskila avlopið til onnur, sum tó skulu rinda arvaavgjald.

- Tryggja tíni kæru!

EGINTRYGGING
Tá lántakarin tryggjar seg sjálvan við deyða, er talan um egintrygging. Tryggingarupphæddin verður tá goldin inn á lán hjá hesum í Norðoya Sparikassa, áðrenn búgvið verður gjørt upp.

Um skuldin er minni enn útgoldna tryggingarupphæddin, verður avlopið goldið næsta avvarðandi, sum er hjúnafelagin ella lívsarvingar (børn).
Eisini kann hjúnafelagin velja at tilskila avlopið av tryggingini til onnur.

Hjúnafelagin kann síðani velja at sita í óskiftum búgvi, og harvið ikki rinda arvaavgjald.

Um lívsarvingar ella onnur fáa part av lívstryggingini ella arva húsini, skulu hesi rinda arvaavgjald av møguligum avlopi av tryggingarupphæddini ella økta virðinum í sethúsinum.

Egintryggingin er serliga ætlað teimum, ið ikki hava møguleika at tekna eina krosslívstrygging, t.d. støk, sum ynskja sær Restskuldartrygging.



# Restskuldartrygging

SOLEIÐIS TEKNAR TÚ EINA RESTSKULDARTRYGGING
Ynskir tú at tekna eina Restskuldartrygging, fæst eitt tekningarskjal og eitt oyðublað til heilsuváttan á deildum okkara ella heimasíðuni www.ns.fo.

Restskuldartryggingin er í samstarvi við Betri Pensjón og tekur við, tá tú hevur latið Norðoya Sparikassa omanfyrinevndu skjøl aftur, treytað av, at heilsuváttanin verður góðtikin av Betri Pensjón.

HÆKKING AV TRYGGINGINI
Ynskir tú at hækka Restskuldartryggingina, skal hetta gerast, áðrenn tú hevur fylt 50 ár.

ÚTGJALD AV TRYGGINGINI
Um tryggjaði doyr, verður tryggingarupphæddin goldin inn á lánið/lánini. Upphæddin verður ikki skattað.

Er samlaða restskuldin í Norðoya Sparikassa lægri enn tryggingarupphæddin, verður munurin útgoldin sum ein kundatrygging og kann tilskilast annan persón.



## - Eisini innivist um óhappið hendir!

UPPSØGN
Ynskir tú ikki longur at verða í tryggingini, kann hendan uppsigast til fyrst í einum mánaði.

Oyðublað fæst á deildum okkara ella á www.ns.fo.

GJALD
Árliga tryggingargjaldið er 0,30% av tryggingarupphæddini.

Tryggingargjaldið verður goldið mánaðarliga. Talvan vísir nøkur dømi um tryggingarupphæddir. Um tryggingarupphæddin verður lækkað, minkar gjaldið samsvarandi.

| UPPHÆDD | GJALD UM MÁNAÐIN |
|---|---|
| kr. 100.000 | kr. 25 |
| kr. 500.000 | kr. 125 |
| kr. 1.000.000 | kr. 250 |
| kr. 1.500.000 | kr. 375 |
| kr. 2.000.000 | kr. 500 |

# Kundatrygging



Tað hendir sjálvandi ikki fyri okkum, men so hendir tað kortini. Ein av okkara kæru fellur brádliga frá og støðan gerst bæði torfør og møtimikil - hvat við tí fíggjarliga?

Tú kanst ikki tryggja teg móti øllum, men millum mongu fyrimunirnar, tú sum kundi í Norðoya Sparikassa kanst fáa, er ein serlig Kundatrygging, ið verður útgoldin við deyða.



## KUNDATRYGGING

Sum kundi í Norðoya Sparikassa kanst tú tekna eina Kundatrygging, ið kann veita ein eyka tryggleika til næsta avvarðandi, ella annan tilskilaðan persón/ar, skuldi borist so á, at tann tryggjaði doyr.

Kundatrygging kann teknast sum antin krosslívstrygging ella egintrygging. Les frammanfyri undir Restskuldartrygging um munin millum krosslívstrygging og egintrygging.

## HVØR KANN TEKNA KUNDATRYGGING?

Kundar, ið eru 18 ár ella eldri, men tó ikki hava fylt 50 ár, hava møguleika at tekna hesa Kundatrygging. Gjørligt er at verða í Kundatryggingini, til ein hevur fylt 67 ár.

Kundatryggingin ávirkar ikki aðrar lívstryggingar.

## SOLEIÐIS TEKNAR TÚ TÆR EINA KUNDATRYGGING

Ynskir tú at tekna eina Kundatrygging, fæst eitt teknRingarskjal og eitt oyðublað til heilsuváttan á deildum okkara ella á www.ns.fo.

Kundatryggingin er í samstarvi við Betri Pensjón og tekur við, tá tú hevur latið Norðoya Sparikassa omanfyrinevndu skjøl aftur, treytað av, at heilsuváttanin verður góðtikin av Betri Pensjón.

*- Tá hugsar tú eisini um hini!*



## TRYGGINGARUPPHÆDD OG GJALD

Tryggingarupphæddin kann vera upp til kr. 2.000.000. Samlaða tryggingarupphæddin fyri Restskuldartrygging og Kundatrygging kann ongantíð vera hægri enn kr. 2.000.000.

Árliga tryggingargjaldið er 0,3 % av tryggingarupphædd-ini. Tryggingargjaldið verður goldið mánaðarliga.

## ÚTGJALD AV TRYGGINGINI

Við deyða tryggingartakarans verður útgoldið til næsta avvarðandi ella annan tilskilaðan persón/ar. Upphæddin verður ikki skattað.

## UPPSØGN

Ynskir tú ikki longur at vera í tryggingini, kann hendan uppsigast skrivliga til fyrst í einum mánaði. Oyðublað fæst á deildum okkara ella á www.ns.fo.

Her eru nøkur dømi um tryggingarupphæddir:

| UPPHÆDD | GJALD UM MÁNAÐIN |
|---|---|
| kr. 100.000 | kr. 25 |
| kr. 500.000 | kr. 125 |
| kr. 1.000.000 | kr. 250 |
| kr. 1.500.000 | kr. 375 |
| kr. 2.000.000 | kr. 500 |

# Bráðsjúkutrygging

## BRÁÐSJÚKUTRYGGING

Afturat Kundatryggingini og/ella Restskuldar-tryggingini er møguligt at tekna eina Bráð-sjúkutrygging, sum er ein eyka trygging, skuldi borist so á, at tann tryggjaði fær eina hættisliga sjúku. Børn í aldrinum upp til 18 ár, eru eisini fevnd av tryggingini, við 60 % av tí sum tryggingartakarin er tryggjaður fyri.

## HVØR KANN TEKNA EINA BRÁÐSJÚKUTRYGGING?

Hevur tú eina Kundatrygging ella Restskuldartrygging í Norðoya Sparikassa, kanst tú tekna eina Bráðsjúkutrygging. Hendan tryggingin skal eisini teknast áðrenn tú verður 50 ár.

Bráðsjúkutryggingin er galdandi til tú verður 67 ár.

## TRYGGINGARUPPHÆDD

Við Bráðsjúkutrygging kanst tú velja millum hesar upphæddir:

| UPPHÆDD | GJALD UM MÁNAÐIN |
|---|---|
| kr. 50.000 | kr. 41 |
| kr. 100.000 | kr. 80 |
| kr. 150.000 | kr. 113 |
| kr. 200.000 | kr. 148 |

- Ein eyka trygging



# Bráðsjúkutrygging

SOLEIÐIS TEKNAR TÚ TÆR
EINA BRÁÐSJÚKUTRYGGING

Ynskir tú at tekna eina Bráðsjúkutrygging, fæst eitt tekningarskjal og eitt oyðublað til heilsuváttan á deildum okkara ella á heimasíðuni www.ns.fo.

Bráðsjúkutryggingin er í samstarvi við Betri Pensjón og tekur við ein mánað eftir at tryggingin er teknað, treytað av, at heilsuváttanin verður góðtikin av Betri Pensjón.

ÚTGJALD AV TRYGGINGINI

Um tryggingartakarin og/ella barn hjá tryggjaða í aldrinum upp til 18 ár fær staðfest eina bráðsjúku - sí Tryggingartreytir fyri bráðsjúkutrygging á www.betri.fo/privat/trygging/folk, verður upphæddin útgoldin til tryggingartakaran.

Upphæddin verður ikki skattað.

UPPSØGN

Ynskir tú ikki longur at vera í tryggingini, kann hendan uppsigast skrivliga til fyrst í einum mánaði.

Oyðublað fæst á deildum okkara ella á www.ns.fo



- Ein eyka trygging



NORÐOYA SPARIKASSI


**Klaksvík**
Ósávegur 1
FO-700 Klaksvík
Tel  475000
Fax  476000

**Fuglafjørður**
í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel  475000

**Tórshavn**
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel  475000
Fax  476015


Fyrivarni verður tikið fyri villum og broytingum í kostnaði!
Allir prísir eru dagførdir til og við 01. juli 2021

**ns.fo**

GRAFIA